## Viðmerking:

*NOTAT, sum P/F Vágatunnilin hevur sent Føroya Landsstýri:*

# Útbjóðing og val av tilboðum ísv. Vágatunnilin

Í samsvar við tilmæli til aðalfundin í felagnum 24. juni 1999, upplýsingar latnir á kunningarfundi fyri løgtingslimir o.o. á Hotel Føroyum august 1999, upplýsingar latnir Løgtingsins Vinnunevnd og almenninginum annars, hevur Vágatunnilin p/f latið bjóða út tunnilsgerð millum norðurlendska arbeiðstakarar og vegagerðina millum føroyskar arbeiðstakarar.

Teir, ið bjóða uppá tunnilsgerðina eru

1. E. Pihl & søn A/S, E. Pihl & Søn P/F, Ístak hf, Skanska AB
2. Højgaard & Shultz A/S, Selmer ASA, Veidekke ASA
3. NCC Danmark A/S, NCC Noreg AS
4. Mika AS, AF Spesialprosjekt ASA, J&K Petersen P/F

Teir, ið bjóða uppá vegagerðina eru

1. Byggisamtøkan HON
2. SP/F JHR entreprenørar
3. P/F Byggitek
4. P/F J&K Petersen
5. P/F Guttesen & Staksberg
6. P/F á Heygum
7. Kanjon sp/f




Í útbjóðingarskrivingum ísv. vegagerðina v.m. hevur felagið í samsvar við licitatiónslógina §2, stk. 4 gjørt vart við, at licitatiónin er bundin, og í samsvar við §4, pkt 2) gjørt vart við at felagið tilskilar sær rætt til frítt at velja millum innkomnu boðini ella at havna øllum.

Við licitatiónina fyri vegagerðina komu boð frá 7 fyritøkum inn. Til tess at meta um hvat boð er til mestan fyrimun fyri felagið, verða boðini mett út frá:

- Samsvar við ætlan fyri útbjóðing
- Prísi
- Alternativum og reguleringum
- Tekniskum viðurskiftum, so sum uppskot til arbeiðsætlan og amboð
- Skipan av arbeiðinum, leiðslu og manning
- Fíggjarligum umstøðum

Undirsjóvartunnilsgerð er so mikið krevjandi arbeiði við atliti til leiðslu, tøkni og fíggjarligum førleika, at felagið helt tað vera neyðugt at venda sær til norðurlendskar arbeiðstakarar og hava oman fyri nevndu samtøk hvør í sínum lagi veitt nøktandi upplýsingar um umstøður teirra við atliti til hesi viðurskifti. Samstundis er gjørt feløgunum greitt, at tey umframt prísin m.a. koma at verða mett eftir samstarvi teirra við føroyskar fyritøkur.

Felagið hevur tilvitað valt at bjóða vegagerðina út millum føroyskar arbeiðstakarar. Hóast fyrimunir kundu verið við at bjóða tunnils- og vegagerð út undir einum m.a. við atliti til samskiping av arbeiðinum, valdi felagið hesa sundurluting við tí fyri eyga, at geva føroyskum arbeiðstakarum møguleika sjálvstøðugt at átaka sær ein munandi part av arbeiðinum, sum gerast skal í sambandi við Vágatunnilin.

Prísurin er sjálvsagt høvuðselementið, sum kappast verður um. Í útbjóðingartilfarinum er biðið um prís uppá arbeiðið og fyri nøkur alternativ: stoypt brúgv í mun til stálbogabrúgv, og avrætting av vegnum við tilfari úr grótbroti í mun til avrætting av soldaðum tunnilstilfari. Somuleiðis hava teir bjóðandi møguleika at koma við egnum alternativum t.d. avsláttur um teir fáa alt arbeiðið, ella samlað tilboð fyri alt arbeiðið v.m.

Hóast ein samlaður prísur verður uppgivin fyri alt arbeiðið, eru eisini einleikaprísir uppgivnir, sum verða nýttir til at regulera prísin fyri meir- & minninøgdir. Vanligur meirkostnaður í mun til eitt tilboð liggur um 5-10%. Í mun til hetta kann eitt fast tilboð gevast, har arbeiðstakarin tekur váðan fyri meir- & minninøgdir upp á seg.

Teknisku viðurskiftini hjá arbeiðstakaranum skulu vera so, at hann við amboðum og útgerð er førur fyri at fremja arbeiðið hann átekur sær innan fyri tann tíðarkarm sum ásettur er. Somuleiðis er umráðandi, at leiðsla og manning er av einum slíkum slag, at trygd er fyri, at neyðuga góðskan verður í arbeiðinum og at teir trupulleikar, sum altíð vilja stinga seg upp í einum slíkum arbeiði, verða loystir skjótt og munadygt. Í sambandi við vegagerðina er umráðandi, at arbeiðsvegurin Vágamegin er klárur til nýtslu í seinasta lagi 6 mánaðar eftir at tunnilsarbeiðið er byrjað í Leynum.

Eins týðandi og teknisku viðurskiftini eru fíggjarligu viðurskiftini hjá arbeiðstakaranum, hann má vera so væl fyri, at hann kann seta neyðugar trygdir (15% av tilboðsupphæddini), hann má lúka treytirnar um falna almenna skuld smb. lóg um avmarking av møguleikum hjá skuldarum at bjóða uppá almenn arbeiði, hann má kunna fíggja sítt arbeiði í minsta lagi í 3 mánaðar og hann má vera soleiðis fyri, at hann ikki verður hóttur av at fara á húsagang meðan arbeiðið fer fram.

Í talvuni niðan fyri er yvirlit við innkomnu boðunum, alternativum og reguleringum, í seinasta teigi eru hesi viðurskifti tald saman við sammetingarprís. Sum tað sæst av talvuni, liggja bæði niðastu boðini ógvuliga nær at hvør øðrum. Felagið hevur biðið um nærri upplýsingar um fíggjarlig viðurskifti, leiðslu, manning og fremjing av arbeiðinum frá feløgunum, sum hava lægstu boðini, t.e. Byggitek og J&K Petersen.

TALVA:::::

Í tí ítøkiliga førinum, har avgerð skal takast um val av tilboði uppá vegagerðina ísv. Vágatunnilin, mugu hesi viðurskifti havast í huga:

1. Byggitek hevur upplýst, at undirarbeiðstakari hjá teimum er E. Pihl & søn og at hetta felag veitir manning, leiðslu og amboð í tann mun Byggitek ikki sjálvt hevur hetta tøkt. Felagið hevur ikki hildið at tað er í samsvar við upplýsingar um ætlanir hjá felagnum yvirfyri Vinnumálastýrinum, tingmonnum, Løgtingsins Vinnunevnd o.ø. at lata arbeiðið fremja við E. Pihl & Søn sum einum týðandi viðleikara. Hetta verður eisini hildið at vera sera óheppið fyri trúvirði hjá felagnum mótvegis øðrum størri feløgum, sum kundu havt áhuga í at boðið uppá vegagerðina, men sum ikki vórðu boðin við.
2. Tilboðsprísurin, við reguleringum fyri alternativ arbeiði, er fyri arbeiðið hjá Byggitek góðar 600.000 kr. lægri enn hjá J&K Petersen. Sammetingarprísurin, tá ið hædd verður tikin fyri at alternativa boðið hjá J&K Petersen er eitt fast boð, er fyri arbeiðið hjá J&K Petersen o.u. 330.000 kr. lægri enn fyri arbeiðið hjá Byggitek. Út frá hesum verður hildið, at prísmunurin millum bæði lægstu boðini, tá ið avtornar, ikki er so týðuligur, at hann kann viga upp móti øðrum her nevndum viðurskiftum.
3. J&K Petersen vísir á køn, navngivin fólk til leiðslu fyri høvuðspartarnar av arbeiðinum og hevur víst á amboð og mannagongdir, ið undirbyggja at hetta felagið kann fremja arbeiðið innan ásettu tíðarkarmarnar.
4. Sambært fíggjarligu upplýsingunum tykist J&K Petersen at hava umstøður til at átaka sær arbeiðið og at fullføra tað, sum ætlað.
5. Sambært fíggjarligu upplýsingunum og viðmerkingum frá fíggjarliga ráðgeva felagsins tykist Byggitek ikki at hava nøktandi fíggjarligar umstøður.

Nevndin í Vágatunnilin p/f hevur út frá oman fyri nevndu viðurskiftum mett, at alternativa boðið frá J&K Petersen er til mestan fyrimun fyri felagið og hevur tí valt at taka upp samráðingar um sáttmála við J&K Petersen.

| Tilboðsgevari | Vegagerð Vágoy Arb 1 | Vegagerð Streymoy Arb2 | Rudding Leynar Arb3 | 1+2+3 | Fyrivarni | Alternativ Brúgv prísmunur | Alternativ Fylla prísmunur | Samlað arbeiði prísmunur | Vanligar reguleringar meir& minninøgdir 5% | Vanligar reguleringar projekt broytingar 5% | Sammetingar Prísur |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Byggisamtøkan HON | 23.263.940 | 5.721.823 | 1.394.400 | 30.380.163 | | -1.143.202 | -976.800 | 0 | 1.519.008 | 1.519.008 | 31.298.177 |
| SP/F JHR entreprenørar | 22.818.316 | 5.625.913 | 1.348.148 | 29.590.377 | | -437.751 | -766.640 | 0 | 1.479.619 | 1.479.519 | 31.345.024 |
| P/F Byggitek | 15.950.067 | 4.898.577 | 1.088.208 | 21.934.852 | FHMF | -321.918 | 0 | -250.000 1) | 1.096.743 | 1.096.743 | 23.556.419 |
| P/F J&K Petersen | 18.157.801 | 4.943.666 | 1.238.310 | 24.339.777 | FHMF | -272.397 | -1.018.460 | -1.039.777 2) | | 1.216.989 | 23.226.132 |
| P/F Guttesen & Staksberg | | 10.491.310 | | | | | | | | | |
| P/F á Heygnum | 22.979.147 | 5.684.539 | 1.326.530 | 29.990.216 | | -693.472 | -3.145.000 | 0 | 1.499.511 | 1.499.511 | 29.150.768 |
| Kanjon sp/f | 28.808.770 | 6.459.450 | 2.189.470 | 37.457.690 | | -630.250 | -444.000 | 0 | 1.872.885 | 1.872.885 | 40.129.209 |

1) Byggitek: Avsláttur í arb 2
2) J&K: sjálvstøðugt fast boð





*Enn er ikki tikin endalig støða til, hvørt ein møgulig barnaansing eisini skal húsast í nýggja bygninginum hjá Føroya Tele, men eisini hetta er ein spurningur, sum støða skal takast til, sigur Andras Róin*

# Taka málið í egnar hendur

*Barnaansing: Føroya Tele arbeiðir í løtuni við at seta á stovn egna barnaansing. Møguliga verður ætlanin veruleiki longu í heyst*

JÁKUP MØRK

Tað er eingin loyna, at trupulleikin við barnaansing hevur verið stórur í høvuðsstaðnum seinnu árini, og við verandi gongd røkist ikki fyri, at tørvurin á ansingarplássum fer at minka komandi tíðina.

### Rakar eisini virkini

Umframt at vera ein trupulleiki hjá kommununi, kann hetta eisini í ávísum førum vera ein trupulleiki hjá fyritøkum í høvuðsstaðnum, tí starvsfólkini ikki vita, hvat tey skulu gera við børnini, ta tíð tey sjálvi eru til arbeiðis.

Harumframt kann tað eisini vera ein trupulleiki hjá fyritøkunum, tí tað í ávísum førum kann forða fyri, at fyritøkan fær fatur á teimum starvsfólkum, sum eru best skikkaði til størvini, tí hesi ikki fáa ansingarpláss.

Fyri at koma hesum trupulleikum til lívs, arbeiðir Føroya Tele í løtuni við eini ætlan, har fyritøkan fær ein aktivan leiklut í málinum.

Í stuttum er ætlanin, at Føroya Tele skal seta á stovn egnan ansingarstovn, soleiðis at fyritøkan sleppur undan ansingartrupulleikanum, sum annars er galdandi í høvuðsstaðnum.

### Ikki bert fyri starvsfólk

Andras Róin, stjóri á Føroya Tele, sigur við Sosialin, at enn væntar nakað í, áðrenn komið er á mál hesum víðvíkjandi.

Hann greiðir frá, at umboð fyri Føroya Tele hava verið á fundi við Býráðið, og at talan var um ein sera positivan fund.

Stjórin leggur upp til, at talan verður um ein stovn, har kommunan, foreldrini og Føroya Tele í felag bera rakstrarkostnaðin. Nakað í tráð við skipanina, sum í dag er galdandi við almennu stovnunum, har landið, kommunan og foreldrini bera kostnaðin fyri barnaansingina.

Sjálvur metir stjórin ikki, at hetta ein útreiðsla fyri virkið:

- Vit eru til reiðar at seta pening av til endamálið. Talan er um ein stóran trupulleika hjá okkum, og vit meta, at tað í longdini loysir seg hjá okkum at taka hetta stig. Millum annað tí hetta kann betra um trivnaðin á starvsplássinum og tí hetta eisini kann vera við til at gera Føroya Tele til eitt meira attraktivt arbeiðspláss.

Talan verður tó ikki um ein stovn, sum bert er ætlaður starvsfólkum hjá Føroya Tele. Andras Róin sigur, at verða pláss tøk á stovninum, kunnu hesi sjálvandi nýtast av kommunalu barnaansingini, men at starvsfólk hjá Føroya Tele koma at hava framíhjárætt, tá børn skulu takast inn á stovnin.

### Tvey ára gomul ætlan

Fyri einum tveimum árum síðani arbeiddi Føroya Tele eisini við eini líknandi ætlan saman við øðrum fyritøkum, men av ymsum orsøkum datt ætlanin tá niðurfyri.

Hesu ferð er felagið farið i holt við ætlanina uttan hjálp frá øðrum virkjum, men Andras Róin útilokar ikki møguleikanum fyri, at samstarv við onnur virki kann koma upp á tal í framtíðini.

### Kanska í heyst

Sum nevnt, so er als ikki komið á mál í hesum spurningi enn, men stjórin vónar, at ætlanin kann gerast veruleiki innan alt ov langa tíð.

- Sjálvandi eru krøv av ymsum slag, sum skulu uppfyllast, áðrenn nakað kann setast í verk, og her hugsi eg um bæði hølisumstøður og fakligur umstøður hjá teimum fólkum, sum møguliga skulu setast á einum slíkum stovni. Vit vóna tó, at myndugleikarnir framhaldandi sýna ein positivan hugburð hesum viðvíkjandi, soleiðis at vit kunnu koma á mál sum skjótast.

Hjá okkum er talan um ein akuttan trupulleika, og tí er umráðandi, at hesin verður loystur hampuliga skjótt.

Andras Róin torir tó ikki at seta nakra tíðarfreist fyri, nær barnaansingin hjá Føroya Tele skal gerast veruleiki, men gongur alt sum tað skal, verður hetta kanska longu í heyst. Júst hvar ein møguligur stovnur hjá Føroya Tele kemur at verða, veit stjórin heldur ikki at siga. - Vit eru í løtuni í ferð við at gera bygningin uppi í Hoyvík kláran at taka í nýtslu, og ein av spurningunum í hesum sambandi er, um vit tá eisini skulu gera høli til barnaansingarstovn, ella um hesi verða gjørd aðrastaðni.

Okkum eydnaðist ikki at fáa viðmerking frá umboðum fyri Tórshavnar Býráð, áðrenn blaðið fór til prentingar.

# Postverksmálið lagt fyri tingið

*Á stuttum tingfundi í gjár varð eykajáttanarlógin um m. a. Postverk Føroya løgd fram. Málið kemur til fyrstu viðgerð hósdagin*

SVEINUR TRÓNDARSON



Tingfundur varð hildin týsdagin. Eittans mál var á skránni og var tað ein eykajáttanarlóg upp á 10,8 mió. krónur, sum Fíggjarmálastýrið heitti á løgtingið um at veita. Meginpartin – níggju mió. krónur – skal Postverk Føroya hava, meðan restin skal brúkast til almanna- og heilsumál. Harafturat vera 1,7 mió krónur latnar til tiltøk fyri børn og ung, men tann eykajáttanin er útreiðsluneutral, tí hon verður fíggjað við peningi frá P/F Ítróttarvedding.

Fyrr í ár gjørdi leiðslan á Postverkinum vart við, at stovnurin kom at mangla pening. Útreiðslurnar vóru hægri enn mett var, tá fíggjarætlanin var gjørd, og tá inntøkurnar ikki vóru hækkaðar samsvarandi, kom tað at hava við sær, at Postverkið kom at mangla pening, áðrenn summarið var runnið.

Hetta kom at hava við sær, segði leiðslan á Postverkinum, at lykilin mátti snarast um, fekst ikki pengingur til vega heilt skjótt. Politisk ósemja hevur verið um, hvussu bygnaðurin á Postverkinum skal broytast, og tí hevur málið drigið út. Nú er so avgjørt, hvussu tann broytingin skal fara fram, og tí biður Fíggjarmálastýrið nú um eykajáttanina upp á níggju mió. krónur.

Tað vóru serliga lønarútreiðslurnar, sum ávirkaðu fíggjarætlanina hjá Postverkinum tann skeiva vegin. Lønarútreiðslurnar eru 5,5 mió. hægri enn mett, og tá stovnurin ikki hevur eina árliga játtan á fíggjarlógini skuldi øll hækkingin fáast inn annan veg. Tað hevur ikki latið seg gera, tí inntøkurnar eru falnar. Inntøkurnar frá bløðum, posti til og úr Føroyum og frímerkjasølan er lægri enn mett, og tí vóru útlit til, at eingir pengar vóru eftir í kassanum hjá Postverkinum áðrenn summarið var av.

Umframt eykajáttanina til Postverkið skal tingið eisini viðgera eykajáttan til almanna- og heilsuverkið. Leiðslubygnaðurin á Landssjúkrahúsinum krevur, at 800 túsund krónur vera veittar afturat. Samstundis skal ein millión játtast afturat til fólk, sum búgva á serstovni í Danmark.

Seinasti parturin av eykajáttanini er til tiltøk fyri børn og ung. Her er talan um eina nýggja konto undir Undirvísingar- og mentamálastýrinum, og hon verður fíggjað við peningi, sum landskassin fær frá P/F Ítróttarvedding.